

# Oljuframleiðsla eystan fyri markið seinkað

Deil:

Jan Müller

03.08.2014 - 14:29

Oljan.fo

Í løtuni er bretska oljufelagið BP í ferð við at byggja út risastóru oljukelduna Clair eystan fyri føroyska markið. Útbyggingin, sum ber heitið "Clair Ridge", er tann næsta á hesi stóru kelduni, sum er mett at goyma umleið 6-7 milliardir tunnur av olju.

Ætlanin varð at framleiðslan skuldi byrja í 2016 men orsakað av ov nógvum arbeiði á suðurkoransku skipasmiðjuni verður framleiðslan helst seinkað til 2017 skrivar bretskir oljumiðlar. Mett verður at hesin parturin av Clair goymir 650 mill. tunnur av olju og fer framleiðsla haðani at vara heilt fram til 2050.

Hóast henda seinkingin sjálvandi er óheppin fyri BP, so er felagið saman við øðrum stórum oljufeløgum so sum Shell, Chevron og ConocoPhillips kortini sera bjartskygt um framtíðina á Atlantsmótinum tvs. í økinum millum Hetland og føroyska markið. Longur syðri verða í løtuni gjørdar útbyggingar av verandi Schiehallion oljukelduni fyri hundraðtals milliardir kr.

Ætlanin er so eisini at bora upp til 12 avmarkingar- og metingarbrunnar á Clair fyri at kanna møguleikarnar í fyrsta lagi fyri eini triðju útbygging